# Ein langur dagur




*Komandi týsdag skulu allir klaksvíkingar inn í KÍ-høllina at atkvøða um, hvør skal sita við landsins stýri*

**Karl Johansen er formaður í valstýrinum í Klaksvík. Uppgávan hjá valstýrinum er at syrgja fyri, at alt gongur rætt fyri seg í valhølunum sjálvan valdagin, og longu nú eru fyrireikingarnar væl í gongd**

LØGTINGSVAL
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Hetta er næstu ferð, at Karl Johansen situr sum formaður í valstýrinum í Klaksvík, meðan løgtingsval er. Harafturat hava tvey býráðsval og tvey fólkatingsval verið í hansara formanstíð, so hetta er ikki nakað ókent fyri hann.

Ein valnevnd er fyri allar Norðoyggjar, og undir hesi valnevnd eru so ymisk stýri fyri hvørt valhøli. Í hesum stýri sita 5 fólk, og teirra uppgáva er at skipa fyri, at alt fer rætt fram í valhølinum sjálvan valdagin.

### Nógvar fyrireikingar

Karl Johansen greiðir frá, at nógvar fyrireikingar eru upp undir eitt val. 14 dagar áðrenn sjálvt valið fer valstýrið í gongd við allar fyrireikingarnar, og eina viku áðrenn valdagin byrja tey at koyra brævatkvøður út til øll tey, sum á einhvønn hátt ikki sjálvi klára at møta upp á valstaðnum.

Hesi fólk siga sjálvi frá, og so verða brævatkvøðurnar koyrdar út til teirra av valstýrinum.

Karl greiðir frá, at talan her sum oftast er um sjúk ella gomul fólk, sum ikki eru gongufør.

Kvøldið áðrenn sjálvt valið hittist alt valstýrið, og brævatkvøðurnar verða gjøgnumgingnar. Tey fólkini, ið hava atkvøtt gjøgnum brævatkvøðu, verða somuleiðis koyrd av vallistanum fyri Norðoyggjar. Hetta verður gjørt, soleiðis at tey sjálvan valdagin ikki kunnu koma inn í valhølini og atkvøða enn eina ferð.

### Langur dagur

Sjálvan valdagin hittast tey aftur í valhølinum klokkan 09.00 á morgni. Tá hava tey ein tíma til at gjøgnumganga alt hølið fyri at kanna, um alt nú er, sum tað eigur at vera, og klokkan 10.00 lata tey dyrnar upp.

Fyri framman stendur nú ein langur og til tíðir strævin dagur, har tey allatíðina eru stødd inni í valhølinum fyri at syrgja fyri, at alt gongur rætt fyri seg.

Afturat sær hava tey oftani nøkur hjálparfólk, sum hjálpa til á ymsan hátt.

Umleið klokkan 20.00 skuldu allir veljararnir helst havt avgreitt sína atkvøðu, og valstýrið kann nú lata dyrnar aftur.

Nú byrjar tann langa og drúgva uppteljingin av øllum atkvøðunum, men sum oftast gongur hetta eisini bæði skjótt og væl.

Tá val var seinast, var uppteljingin liðug longu klokkan 22.00, og valstýrið kundi sleppa til hús eftir ein langan dag.

Salong Afrodite:

## Kundin vil slappa av – ikki tosa um politikk

**Frisørstovan Salong Afrodite merkir ikki so nógv til valfepurin, sum herjar í býnum hesar dagarnar**

LØGTINGSVAL
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Joan Baldvinsdóttir, sum eigur og rekur Salong Afrodite, heldur ikki, at valfepurin merkist so nógv í arbeiðsdegnum hjá henni.

– Kundin kemur inn her fyri at slappa av, og ikki fyri at tosa um politikk, sigur Joan.

Onkuntíð hevur hon tó sett onkrum onkran spurningin viðvíkjandi komandi løgtingsvalinum, men áhugin er ikki so stórur fyri at koma inn á tað politiska tosið.

– Viðhvørt hava kundarnir tó onkra viðmerking til ymiskt, sum verður sagt í útvarpinum, men meir enn tað merkja vit ikki, greiðir Joan frá.

Joan sigur annars, at tey ungu sum heild als ongan áhuga hava fyri løgtingsvalinum. Tey virka meir líkaglað.

Joan heldur eisini, at mannfólkini vísa seg at hava størri áhuga fyri tí politiska orðaskiftinum, sum er í hesum døgum. Teir mannligu kundarnir kunnu onkuntíð tosa eitt sindur aftur og fram um onkur politisk evni, meðan kvinnurnar heldur vilja tosa um okkurt annað.

Sjálvt hevur Joan tikið støðu til, hvønn flokk hon skal velja. Men enn veit hon ikki, hvør persónur sleppur avstað við júst hennara atkvøðu.



*– Kundin kemur inn í Salong Afrodite fyri at slappa av heldur enn at tosa um politikk, heldur Joan Baldvinsson, sum eigur og rekur frisørstovuna*

# Valfepur í Klaksvík



*Jórun Mørkøre*



*Óli Biskopstø*



*Gudny Benjaminsdóttir*



*Óla Hans Biskopstø*

**Klaksvíkin er sum so nógv onnur pláss í Føroyum merkt av politikki hesar dagarnar. Á arbeiðsplássum verður tosað um politikk í kaffipausunum, og á gongubreytini verða meiningar um øll tey ymsu valevnini havd á lofti. Sosialurin hevur verið ein túr í býnum og máta valfepurin á staðnum**

FÓLK Á GØTUNI
*Ragnhild Ellingsgaard*

*Jórun Mørkøre, bakari*

– Her merkja vit í øllum førum nógv til valfepurin. Men tað er mest inni á sjálvum bakarínum, ikki í handlinum.

Arbeiðsfólkini her umboða bæði Sambandsflokkin, Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin, og vit ganga øll og mala um beinini hjá hvør øðrum við ymsum meiningum. Hetta skapar sjálvandi stórar og harðar diskutiónir, men tó eru vit ongantíð farin til hendurs enn, sigur hon skemtandi.

– Men sum heild haldi eg, at stórur áhugi er fyri valinum í ár. Sjálv havi eg ikki tikið endaliga støðu til, hvønn eg skal velja. Men tað fer so ikki at hava nakað við loysing at gera.

*Óli Biskopstø, starvast hjá F.K.*

– Valfepurin merkist onkrastaðni, kanska serliga á arbeiðsplássunum. Á mínum arbeiðsplássi verður øgiliga nógv tosað um øll møgulig evni, men tað eru mest tey tilkomnu, sum siga nakað.

Tey ungu tosa ikki so nógv, men hava hóast tað ein áhuga fyri politikkunum.

– Sjálvur havi eg avgjørt, hvør fer avstað við mínari atkvøðu. Men tað ætli eg mær ikki út við her.

*Gudny Benjaminsdóttir, skrivstovukvinna*

– Eg merki ein stóran valfepur her á arbeiðsplássinum. Vit eru øll sera ymisk og hava øll okkara meining, so nógv verður kjakast aftur og fram í pausunum.

Eisini í býnum merkir man nógv til valfepurin, fólk hava nógv størri áhuga í løgtingsvalinum nú enn seinast.

– Sjálv havi eg fyri langari tíð avgjørt, hvør fær mína atkvøðu, og hesu avgerð haldi eg fast við.

*Óla Hans Bisopstø, lærari*

– Á arbeiðsplássinum verður alla tíðina tosa um politikk, og serliga verður tosað um allar teir ymsu flokkarnar. Tað eru mest mannfólki, sum tosa harðast, kvinnurnar eru meiri friðarligar.

– Løgtingsvalið í ár er øgilliga spennandi, og eg havi fyri langari tíð síðani avgjørt, hvønn eg fari at velja.



# Brandur á konsertferð í Føroyum



*– »mWaiting in the Moonlight« er framleidd serliga til tann føroyska og tann íslendska marknaðin, og tí er tann næsta fløgan eitt sig víðari á leiðini. Fyri at kunna røkka tí útlendska marknaðinum mugu vit eisini hava eina meir altjóða fløgu við í skjáttuni, sigur Steintór*

**Tann komandi mánaðan fer Brandur Enni á eina konsertferð í Føroyum**

TÓNLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

Brandur hevur ikki ligið á latu síðuni, eftir at hann gav út fløguna »Waiting in the Moonligt«. Í løtuni fyrireikar hann saman við øðrum eina stóra konsertferð, sum byrjar í komandi mánaða.

### Nógvar effektir

Brandur kemur sjálvandi sjálvur at luttaka á hesum konsertum, men saman við honum á pallinum verða eisini dansigentir og kórsangarar.

Dansigenturnar eru tær somu, sum eisini vóru við til konsertina í Norðurlandahúsinum og á sjónbandalagnum, sum varð framleitt í sambandi við fløguútgávuna.

Men kórsangararnir eru hesu ferð nýggir. Talan er um ungar sangarar, sum eru valdir út til bert hesar konsertirnar.

Harafturat verður stórur dentur lagdur á framførsluna á pallinum, og hetta verður eisini gjørt við eini rúgvu av effektum av ymsum slag.

Frá fyrireikarunum frætta við, at talan bæði er um ljós-, ljóð- og roykeffektir, og eisini verður tær sokallaðu íseffektirnar tiknar í nýtslu.

Nógv verður eisini lagt í sjálva pallsetanina, so talan er um eina konsert, har tú bæði fært nakað til eygu og oyru.

Konsertirnar byrja klokkan 21.00 á kvøldi, og enda einaferð áðrenn midnátt.

Skipað verður konsertum á hesum støðum:
17. mai á Kambsdali
20. mai á Tvøroyri
24. mai í Tórshavn

### Brandur uttanlands

Samstundis, sum Brandur saman við hansara fólkum, arbeiðir við fyrireikingum til konsertferðina, so hava tey ta síðstu tíðina eisini gjørt nakað av arbeiði uttanlands.

– Serliga í Íslandi hava vit merkt ein stóran áhuga fyri Brandi, sigur Steintór Ramsussen, samskipari.

Talan er eisini um, at Brandur møguliga skal hava onkra framførslu í Reykjavík á sjálvum tjóðardegnum hjá Íslandi tann 17. juli.

– Okkara fyrsta mál er at røkja heimamarknaðin í Føroyum, og síðani at royna at sláa ígjøgnum í Íslandi. Eftir hetta eru ætlanirnar so at kunna fara enn longur, greiðir Steintór frá. Men hóast Ísland er fyrsta málið, so er arbeiðið í øðrum londum longu byrjað.

– Millum annað hava vit verið í Danmark nakrar ferðir, har vit royna at fáa Brand eitt sindur fram, men slíkt arbeiði tekur langa tíð, sigur Steintór Rasmussen. Hann greiðir eisini frá, at í løtuni verða fleiri nýggir sangir skrivaðir, sum síðan skulu útgevast á eini nýggjari fløgu, sum serliga vendir sær til tann útlendska marknaðin.

– »Waiting in the Moonlight« er framleidd serliga til tann føroyska og tann íslendska marknaðin, og tí er tann næsta fløgan eitt sig víðari á leiðini. Fyri at kunna røkka tí útlendska marknaðinum mugu vit eisini hava eina meir altjóða fløgu við í skjáttuni, greiðir Steintór frá.

Men sum vit skilja, so hevur Steintór saman við øðrum longu havt samband við donsk plátufeløg og onnur, sum hava víst Brandi áhuga. So møguliga fer okkurt spennandi at spyrjast eisini burtur úr hesum.

### Nýtt sjónband

Í løtuni verður síðsta hond løgd á sjónbandalagið, sum varð framleitt í samband við fløguútgávuna.

Hetta sjónbandalag verður nú framleitt eisini til tann útlendska marknaðin, soleiðis at Brandur ikki bert hevur fløguna at bjóða fram.

Harafturat eru fyrireikingar eisini farnar í gongd við framleiðingina av einum nýggjum sjónbandi.

Hetta sjónband inniheldur upptøkur av Brandi gjøgnum langa tíð, og skal skipast sum eitt slag av dokumentarfilmi um hendan unga og evnaríka drongin av Tvøroyri.

Nýggja sjónbandi verður framleitt sum eitt slag av sjónvarpssending, men ætlanin er, at tað eisini skal fáast til keyps einaferð í summar.

## Fløgan gongur sum heitt breyð

**Hóast nakrar vikur longu eru farnar, síðan Brandur gav út fløguna »Waiting in the Moonlight«, so gongur sølan enn sum heitt breyð**

TÓNLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

Frá 3’arinum í Havn frætta vit, at stórur eftirspurningur hevur verið eftir fløguni hjá Brandi, og longu nú hava teir selt yvir 1.000 eintøk av »Waiting in the Moonlight«.

Hóast hetta er væl megnað, so er hetta er ikki eindømi í føroyskari tónleikasøgu. Aðrar føroyskar tónleikaútgávur hava fyrr selt eins nógv, men tó er tað ikki ofta, at slíkur eftirspurningur er eftir eini ávísari fløgu í so langa tíð.

Tó er 3’arin ikki tann einasti, ið kann bjóða kundum sínum eitt eintak av »Waiting in the Moonlight«.

Fløgan verður eisini seld aðrastaðni, og sum vit skilja, eru longu nú tilsamans seld eini 1.800 eintøk av fløguni ymsastaðni í landinum.

Fløgan inniheldur 14 sangir, harav 6 eru skrivaðir á føroyskum, og hinir 8 á enskum máli.